Jenis av Rana
Steffan Klein Poulsen
Beinir Johannesen
Jacob Vestergaard
løgtingsfólk

Broytingaruppskot VII

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 99/2023: Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 14, stk. 2, verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2*. Grunnurin verður fyrisitin av einum stýri, sum landsstýrisfólkið velur. Landsstýrisfólkið velur formann og varaformann, hinir fimm nevndarlimirnir og varalimirnir verða valdir soleiðis: Ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Bóndafelag Føroya, ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Føroya Óðalsfelag, ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Tjóðsavninum og Umhvørvisstovuni í felag, ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Ferðavinnufelagnum og Visit Faroe Islands í felag, og ein limur og ein varalimur eftir tilmæli frá Kommunufelagnum.”

Viðmerkingar
Fyri at styrkja umboðan jarðareigara og jarðarumsitara og harvið demokratisku ávirkanina, verður limatal teirra styrkt, so hesir fáa ein nevndarlim hvør, heldur enn ein nevndarlim í felag.

Serligar viðmerkingar:

Ad. 1
Við broytingini fáa Bóndafelag Føroya og Føroya Óðalsfelag hvør sín lim í grunnin, sum skal umsita burðardygdargjaldið.

Á Løgtingi, 21. mai 2024

Jenis av Rana Jacob Vestergaard Steffan Klein Poulsen

Beinir Johannesen